# Fult hús til Summar Festivalin

**Áhugin er sera stórur fyri at fáa eitt stað at búgva í Norðoyggjum, tá ið Summar Festivalurin verður í august. Norðoya Kunningarstova sigur, at áhugin hevur ongantíð verið so stórur, sum hann er júst í ár**

SUMMAR FESTIVALUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í august mánaði verður Summar Festivalurin hildin fyri triðju ferð, og fyrsti útlendsku bólkarnir, sum skulu spæla á festivalinum, eru kunngjørdir. Atgongumerkjasølan hevur sambært fyrireikarunum gingið sera væl fyrstu tíðina, og á Norðoya Kunningarstovu eru tey eisini langt síðani farin at merkja stóra áhugan fyri festivalinum í Klaksvík.

– Fólk hava víst stóran áhuga fyri Summar Festivalinum bæði í fjør og í fyrraárið, men áhugin hevur ongantíð verið so stórur, sum hann er júst í ár, sigur Christian Olsen, leiðari fyri Norðoya Kunningarstovu.

– Øll summarhúsini í Norðoyggjum eru langt síðani leigað út á Summar Festivalinum, og vit royna at leita við ljós og lykt fyri at finna fleiri hús, sum fólk kunnu búgva í á festivalinum, sigur hann.



*– Vit hava merkt eina stóra reaktión, eftir at bólkar eru kunngjørdur til festivalin í ár, og eg rokni við, at soleiðis verður eisini næstu tíðina. Vit rokna við, at áhugin fer rættiliga at eksplodera, nú mai mánaði stendur fyri durðum, sigur Christian Olsen, leiðari fyri Norðoya Kunningarstovu*

*Mynd: Erik Biskopstø*

**Gistingarhús á tremur**

Um eina góða viku verður Norðoyatunnilin tikin alment í brúk, men hóast fasta sambandið er á veg, og fólk fáa nýggjar møguleikar at ferðast aftur og fram, so vilja nógv fólk gista í Norðoyggjum, tá festivalurin verður hildin.

Øll summarhúsini í Norðoyggjum eru leigað út til festivalin, Hotel Norð hevur fult hús, og á Sjómansheiminum í Klaksvík er bíðilisti fyri at sleppa innar fyrsta vikuskiftið í august.

Harafturat hava fleiri biðið sær pláss til campingvognar, og her hevur Norðoya Kunningarstova góðar umstøður at bjóða.

– Fleiri hava longu skrivað seg upp til campingpláss. Vit hava 18 el-íbindingar sum er, men tær kunnu gerast fleiri. Umstøðurnar til campingvognar eru betraðar síðani í fjør, og fólk eru væl nøgd við hesi plássi, tí summi hava lagt dent á, at tey vilja hava sama pláss sum í fjør, sigur Christian Olsen.

**Góðir møguleikar at tjalda**

Umframt campingplássini hevur Norðoya Kunningarstova eisini nógv tjaldingarpláss at ráða yvir, og her hava fólk longu skrivað seg upp á listan fyri at tryggja sær pláss.

– Vit hava roynt at bíða eitt sindur við at skriva fólk upp til tjaldingarpláss, men nú kunnu fólk gera vart við seg, um tey vilja hava eitt pláss. Vit hava nógv pláss til tjalding, og umstøðurnar eru heilt góðar, sigur Christian Olsen.

Umframt gistingina á landi, hava nógv fólk eisini búð í bátum, sum hava ligið við bryggju í Klaksvík, og í fjør var rættiligur bátastevnulag á Stongunum, har ein ørgrynna av smábátum lá á festivalinum. So hóast koyrandi verður á Summar Festivalin í ár, so fara ivaleyst nógv fólk at sigla til Klaksvíkar.

– Vit hava merkt eina stóra reaktión, eftir at bólkar eru kunngjørdur til festivalin í ár, og eg rokni við, at soleiðis verður eisini næstu tíðina. Vit rokna við, at áhugin fer rættiliga at eksplodera, nú mai mánaði stendur fyri durðum, sigur Christian Olsen.

# Poul Dissing, Benny Andersen og Tórshavnar Manskór á pall

**Sunnudagin 23. apríl 2006 kl. 16.00 verður konsert við teimum væl kendu dønunum Poul Dissing og Benny Andersen & Tórshavnar Manskóri**

KONSERT



»Eitt dagur við Dissing og Andersen«.

Povl Dissing hevur saman við Benny Andersen glett danskarar í øllum aldrum síðan 1973, tá ið plátan »Svantes Viser« legði nýggjan botn til, hvat syngjast kann um - og hvussu tað kann syngjast!

Eitt skaldsligt samstarv varð føtt millum Povl Dissing og Benny Andersen, og tað varð byrjanin til eitt av teimum best dámdu samansetingunum á danska tónleikapallinum, og eitt ódeyðiligt repertoire av sangum og vísum.

Povl Dissing hevur í sínum tulkingum ein beinleiðis sannleika, sum rakar áskoðarafjøldina beint í sálina, og eingin kann sum Benny Andersen venda tí danska málinum í nýggjum og óvæntandi leiðum. Og ikki minst siga frá um dagligdagin hjá okkum øllum, soleiðis at hann ljóðar sum eitt ævintýr.

Megin í tulkingingum Dissings innrammar tann undirspælda humorin og vinsæla hitan, ið er so Benny Andersen'skur. Svante og Roselina eru miðpersónarnir í heiminum hjá hesum skaldsliga samstarvi, har í dagligdagurin verður ævintýrligur og undurfullur.

Tórshavnar Manskór fer eisini at syngja nakrar sangir.

## Vestmenn í Kagganum

Føroya kendasti kontribólkurin gjøgnum tíðirnar Vestmenn fer aftur á pall. Vestmenn eiga eina av Føroya mest seldu tónleikaútgávum, og serliga lagið »Eg siti so eina« er vorðið fólkaogn. Leygarkvøldið spæla Vestmenn í Kagganum.

Dansivinarligi kontritónleikurin hjá Vestmonnum er sera vælumtóktur, og hevur fylt flestu dansistøð í landinum gjøgnum árini. Í fjør var Vetmenn forsangarin Ólavur Højgaard í Nashville og tók fløguna »Úr Vestmanna til Nashville« upp, henda fløga vísti at áhugin fyri føroyskum kontri enn er stórur, tí hon fekk sera góða móttøku. Tað er ivaleyst ikki ósannlíkt, at okkurt av fløguni verður at hoyra leygarkvøldið.

**nud**

## Rikke Hvilshøj kemur á vitjan

**Danski ráðharrin í innflytaramálum, Rikke Hvilshøj, kemur á vitjan í Føroyum hósdagin og fríggjadagin**

Síðani oktober mánað síðsta ár hevur ein nevnd við føroyskum og donskum embætismonnum arbeitt við at útgreina hvussu málsviðgerðin av útlendingamálum kann gerast skjótari og smidligari, enn hon er í dag. Hetta arbeiði er nú liðugt.

Í hesum sambandi fara Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, og danski ráðharrin í innflytaramálum, Rikke Hvilshøj, at røða um frágreiðingaina á fundi tann 20. apríl í Innlendismálaráðnum, Skibsted pakkhúsi í Tinganesi.

Aftaná fundin, kl. 15.15 hósdagin tann 20. apríl, fáa fjølmiðlar høvi at seta landsstýrismanninum og ráðharranum spurningar. Hetta verður somuleiðis í Skibsted pakkhúsi í Tinganesi.

## Ein bretsk kvinna brúkar 2 milliónir til vakurleika

Ein kanning, ið bretska blaðið New Woman Magazine júst hevur gjørt millum bretskar kvinnur vísir, at miðal nýtslan hjá bretskum kvinnum til ymiska vakurleikaviðgerð og vakurleikavørur, sum make-up, ymisk krem og luktir er 2 milliónir kr. í vaksna lívinum.

Kvinnurnar vóru somuleiðis spurdar hvat tær vildu slept fyri at havt ráð til sínar yndis vakurleikavørur. Her søgdu 37 % at tær vildu livað uttan mat, hetta er saman prosenttal, sum vildi sloppið eini date við Brad Pitt heldur enn at liva uttan sínar yndis vakurleikavørur.

**nud**

Lesið Sosialin